gult4 cyan4 magenta4 svart4



# – Tit siga ikki allan sannleikan

**Skiftandi landsstýrismenn siga ikki allan sannleikan um játtanina til fólkaskúlan, heldur Esmar Berg, fyrrverandi formaður í Føroya Lærarafelag, sum vísir á, at hóast tølini eru størri, so er játtanin til fólkaskúlan minkað**



*Esmar Berg vísir á, at tað er bara helvtin av sannleikanum at siga, at játtanin til fólkaskúlan er økt. – Krøvini eru økt nógv meira, tí er játtanin minkað, sigur hann*

FÓLKASKÚLIN
*Eirikur Lindenskov*

– Tað er løgið, at skiftandi landsstýrismenn kropp á kroppi koma fram í fjølmiðlunum og siga, at játtanin til fólkaskúlan er økt, uttan at teir siga meira.

Hetta sigur Esmar Berg, fyrrverandi formaður í Føroya Lærarafelag í grein í Skúlablaðnum, sum kom út í gjár.

Esmar Berg spyr, hví landsstýrismenninir ikki siga meira?

– Teir vita, at tað er bara helvtin av søguni, teir siga. Teir vita, at krøvini til fólkaskúlan eru økt nógv meira enn játtanin, og tí hava vit hesa vanukkuligu støðuna, sum bara verður meira og meira álvarslig.

Fyrrverandi formaðurin í lærarafelagnum vísir á, at landsstýrismenninir sjálvandi vita, at krøvini til fólkaskúlan eru økt nógv meira enn játtanin. Hann vísir á, at vit hava fingið eina nýggja skúlalóg, sum setir nógv størri krøv. Vit hava fingið KT-tøknina inn um skúlagátt, nýggjar semjur eru gjørdar um arbeiðs- og lønarviðurskiftinin hjá fólkaskúlalærarum, og hetta er alt gjørt við vælsignilsi frá skiftandi løgtingum og landsstýrum, men játtanin er ikki fylgd við, sigur hann.

– Fyri tað um peningajáttanin er økt, so sigur hetta einki meira, enn tá abbar og ommur okkara øtaðust um, hvussu nógv alt kostaði – tá vit vóru óvitar, sigur Esmar Berg.

– Alt Føroya fólk veit, at játtanin til fólkaskúlan er minkað, sjálvt um peningaupphæddin og tølini eru størri.

Esmar Berg heitir tí á tey, sum hava ovastu ábyrgdina av tí føroyska fólkaskúlanum, um at gevast við at tosa við lærararnar, sum vóru teir óvitar, og tíverri ikki vita betur.

– Vit vita, at tit siga ikki allan sannleikan, og tað vita tit eisini – tit vilja bara ikki. Spurningurin er bara hví, at so er, spyr Esmar Berg, fyrrverandi formaður í Føroya Lærarafelag.

## Tøkk

Teimum sum á ymsan hátt vístu samkenslu, tá ið elskaða kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Birgith Mortensen**
**Hoyvík**

doyði og varð jarðað, takka vit hjartaliga.

Vegna tey avvarðandi

**Hans, Elisabeth og Niels**

# Flogfelagið keypt Plastvirkið

**Flogfelag Føroya hevur keypt virkisbygningin hjá Føroya Plastídnaði í Sørvági. Ætlanin er at nýta bygningin í samband við ferðavinnu**



*Tað er gamli virkisbygningurin hjá Føroya Platídnaði beint niðan fyri flogvøllin, sum Flogfelag Føroya hevur keypt og ætlar at brúka til hotelkømur*

*Savnsmynd*

HOTELVINNA
*Edvard Joensen*

Flogfelag Føroya hevur keypt gamla virkisbygningin hjá Føroya Plastídnaði við flogvøllin í Vágum. Ætlanin er at innrætta hotelkømur í bygninginum.

– Tað er ein sannroynd, sigur Uni Danielsen á Flogfelag Føroya, at hotelkapasiteturin í Føroyum er ein fløskuhálsur hjá ferðavinnuni. Serliga her mitt um summarið kann standa á at fáa innivist.

Og um veturin er rættiliga nógv skeiðvirksemi í landinum. Og eisini har kunnu umstøðurnar betrast, sigur hann.

Flogfelag Føroya, sum eigur Hotel Vágar, hevur nú keypt gamla Plastvirkið, sum stendur beint niðan fyri Hotel Vágar við flogvøllin.

Ætlanin er at innrætta hotelkømur og fundarrúm, sum eisini kunnu brúkast til skeiðvirksemi í bygninginum, sigur Uni Danielsen.

Hann sigur, at enn er ikki endaliga avgjørt, hvussu bygningurin verður nýttur. Tað kann henda, at onkur kanska hevur hug at leiga burtur av til skrivstovur, og so er tann møguleikin avgjørt eisini til staðar, sigur Uni Danielsen.

Enn er verkætlanin bert á tekniborðinum, men verður væntandi klár rímiliga skjótt, sigur hann.

Bygningurin er stórur. Hann er tómur og tí rímiliga léttur at innrætta eftir, hvussu Flogfelagið vil hava hann. Bygningurin er í trimum hæddum, so nógv er at taka av.

Mest sannlíkt er, at gjørt verður av at innrætta hotelkømur í bygninginum. Tey fara so at verða fult á hædd við nútíðar hotelkømur við wc og bað og annars tí, einum slíkum kamari hoyrir til.

Tó er ikki ætlanin at gera eitt heilt nýtt hotel, sigur Uni Danielsen. Hotel Vágar er jú næsti granni, so matstova og tað, sum har til hoyrir, verður ikki gjørt í Plastvirkinum. Har verður felags nýtsla.

Spurdur um hvørt ætlanin er at gera okkurt í millum bygningarnar báðar, soleiðis at teir verða samanbygdir, sigur Uni Danielsen á Flogfelag Føroya, at tað hevur ikki verið upp á tal enn, eins og eingin endaligur prísur er akturelur heldur, sum er.

Av tí, at verkætlanin enn bert er komin á tekniborðið, er ikki heilt greitt, nær klárt verður at taka bygningin í nýtslu. Men av Flogfelag Føroya verður sagt, at tað avgjørt er tørvur á størri gistingarhúskapasiteti, og at teir síggja góðar møguleikar í hesum bygninginum, sum jú liggur rættiliga væl fyri.

# Triton tikið russara undir Føroyum

**Verjuskipið Triton tók seinnapartin týsdagin ein russiskan trolara, sum fiskaði ólógliga á Ytra Banka**

SJÓVERJA
*Edvard Joensen*



Sjóverjuskipið Triton tók russiska trolaran Istok úr Murmansk, meðan hesin tógaði 12 fjórðingar innan fyri føroyska fiskimarkið á Ytra Banka seinnapartin týsdagin.

Tað var tyrlan hjá Triton, sum varnaðist trolaran inni á føroyskum sjóøki. Triton, sum var í farvatninum fór til trolaran og setti fólk umborð.

Russiski skiparin varð biðin um at vátta positiónina. Hann váttaði at vera inni á føroyskum øki, eins og hann viðgekk at hann fiskaði. Hann varð tí biðin um at fylgja við Triton til Havnar, har málið verður latið løgregluni, sigur Færøernes Kommando.

Triton verður væntandi á Havnini við russiska trolararnum seinnapartin mikudagin, sigur Eli Lyngvej-Larsen, pressuovasti á Færøernes Kommando.

gult5 cyan5 magenta5 svart5



Donsk listakvinna í Føroyum:

# Fær íblástur av landslagnum

**Sys Hasforth Korshøj er útbúgvin myndlistafólk og grafikari. Hon hevur í hesum døgum framsýning á Termovirkinum í Havn. Hon er í Føroyum við familju at fáa sær íblástur til listarliga arbeiði**

LISTAFRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

At Sys Hasforth Korshøj hevur fingið íblástur av síni Føroyaferð sæst beinanvegin, tá hugt verður at acrylmálningunum, sum hanga í einum horni á Termovirkinum við Sundsvegin í Havn.

Málningarnir ímynda allir okkurt føroyskt. Teir flestu eru bláligir málningar av landsløgum. Risin og Kellingin síggjast aftur í onkum málningi. Eisini hevur hon málað smá neyst, sum hon er hugtikin av.

Sys heldur til í Leirvík, meðan hon er í Føroyum, og onkur málningur er av Leirvíks bygd. Hon hevur fingið loyvi at nýta ateliérið hjá Jóhannes Kristensen, sála, í Leirvík. Sys greiðir frá, at hon sendi eina umsókn til Martin Petersen í Fuglafirði, har hon m.a. vísti á nøkur av sínum verkum. Nakað seinni stóð henni í boði at koma til Føroya. Maður hennara og trý børn eru eisini við á ferðini. Familjan hevur verið her í tvær vikur, og tey vera verandi í tvær vikur afturat.






*Listakvinnan Sys Hasforth Korshøj hevur verið í Føroyum í tvær vikur at fáa sær íblástur til málningar. Nógv er komið burturúr, og hon er væl nøgd higartil*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Fingið íblástur

Sys sigur, at endamálið við ferðini longu er rokkið, og at hon hevur fingið íblástur til fleiri málningar. Málningarnir á framsýningini eru allir málaðir í Føroyum.

– Eg eri ikki vónbrotin av ferðini. Tey føroysku listafólkini duga væl, og tað er eisini hugtakandi at síggja, hvussu tey arbeiða, sigur Sys, sum málar allatíðina, meðan hon er her, men tíð hevur eisini verið til túrar.

Hon greiðir frá, at hon fer at arbeiða við føroyskum motivum í longri tíð, eftir at hon er komin heimaftur. Nógvar myndir eru tiknar, og tí kann hon halda á at arbeiða við Føroyum í eitt hávt ár í minsta lagi.

## Hitti vinkonu aftur

Orsøkin til at Sys hevur fingið innivist á Termovirkinum er, at Gunnbjørg Gunnbjørgsdóttir, ið arbeiðir á staðnum, hevur boðið henni.

Tær báðar vóru í sama flokki í Keypmannahavn fyri 25 árum síðani og hava ikki hitt hvønn annan síðani. Nú hava tær fingið samband aftur, og Sys sýnir fram á arbeiðsplássinum hjá Gunnbjørg.

Umframt at mála skrivar Sys eisini yrkingar um hennara fyrsta túr til Føroyar, men hon fæst mest við málningar.

Til ber at keypa málningarnar hjá Sys á Termovirkinum.

# Zacharias Heinesen prýðir 50-krónu seðil

**Danski Nationalbankin hevur sent ein nýggjan føroyskan 50-krónuseðil í umferð. Tilsamans eru sendir umleið 100.000 nýggir seðlar til Føroya. Forsíðan er eitt veðrahorn, og baksíðan er av Beinisvørði. Zacharias Heinesen hevur myndprýtt seðlarnar**

PENGASEÐIL
*Stefan í Skorini*

Høvuðsliturin á teimum nýggju 50-krónuseðlunum er dustbláur, meðan teir gomlu hava ein klárari bláan lit. Tann nýggi seðilin er eisini ein sentimetur styttri enn tann gamli. Eitt koparprent av veðrahorni er á forsíðuni. Aftan á seðlinum er vatnlitamynd av Lopranshaga við útsýni móti Beinisvørði, har feitilendi eru.

Lógin um pengaseðlar sigur, at føroysku seðlarnir skulu hava somu stødd og sama virði sum teir donsku seðlarnir. Av tí at nýggir pengaseðlar eru komnir í Danmark, har stødd og seðlavirði eru broytt, verða somuleiðis givnir út nýggir pengaseðlar í Føroyum.

## Røð av nýggjum seðlum

Komandi árini fer Nationalbankin at endurnýggja allar teir føroysku pengaseðlarnar. 50-krónuseðilin er tískil bara tann fyrsti í eini røð.

Um eitt gott ár verður nýggjur 100-krónuseðil givin út, og seinni kemur 200-krónuseðil. Áðrenn trý ár eru liðin verða eisini nýggir 500- og 1000-krónuseðlar settir í umferð í Føroyum.

Eftir ynski úr Føroyum fara nýggju seðlarnir ikki at hava fólk sum myndevni. Nýggju seðlarnir fara allir at hava ein likamslut av djóri á forsíðuni, og á baksíðuni verða vatnlitamyndir av føroyskum landslagi.

Tað er Zacharias Heinesen, sum hevur málað allar hesar vatnlitamyndirnar, og hann heldur sjálvur, at tað hevur nógv at siga fyri hann sum listamálara at fáa loyvi at prýða pengaseðlar okkara.

Myndevni á nýggja 100-krónuseðlinum, sum er dustgulur, er úr Klaksvík. Á dustviólubláa 200-krónuseðlinum er myndin úr Vágum. Á grøna 500-krónuseðlinum er mynd av Hvannasundi. Myndin á reyða 1000-krónuseðlinum er av Sandoynni.



*Vit skulu nú venja okkum við nýggjar 50-krónuseðlar, sum hevur mynd av veðrahorni á forsíðuni og vatnlitamynd av Beinisvørði á baksíðuni*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Seðlarnir hava allir somu breidd, men longdin økist við einum sentimetri fyri hvønn seðil.

Í dag er virði av pengaseðlum í umferð í Føroyum 276 milliónir krónur. Nógv tann størsti parturin er 1000-krónuseðlar. Virði av teimum gomlu 50-krónuseðlunum er 9 milliónir. Sendir eru 50-krónuseðlar fyri 5 milliónir til Føroya á hesum sinni, men fleiri verða sendir seinni.

Komandi dagarnar verður faldari um nýggju seðlarnar sendir øllum húsarhaldum í Føroyum.

Gomlu 50-krónuseðlarnir, sum eru umleið 25 ára gamlir, eru enn í umferð. Teir verða settir úr gildi so hvørt. Tú kanst enn lata peningastovnunum gamlar pengaseðlar, sum eru gjørdir fyri 50 árum síðani, tá lóg um pengaseðlar varð sett í gildi í Føroyum.